


# Snorklaðu við Gjógv

Fríggjadagin 28.07. fingu 11 føroyingar eitt náttúruupplivilsi í heimsflokki. Hetta kvøldið skipaði Faroe Dive fyri snorkling í gjónni við Gjógv. 11 fólk í øllum aldrum komu spent til Gjáar at royna snorkling fram við føroysku strondunum. Fleiri av luttakarunum høvdu roynt hendan aktivitet aðrastaðir í heitum londum, men ongantíð her á okkara leiðum. Áðrenn luttakarinir fóru á sjógv, fingu tey útgerð frá fyriskiparunum. Turrdrakt, brillur, snorkil og fitjur.

Eftir eina stutta leiðbeining varð fari út í gjónna, fram við tí norðara arminum á gjónni. Ein leiðari var allatíðina við luttakarunum á sjónum og hjálpti teimum, um tørvur var á hesum.

Flestu av luttakarunum vóru sera bilsin av hvussu framúr vakur heimurin í sjónum, um oyggjar okkara í verðuleikanum er. Onkur nevndi at heimurin í gjónni var minst líka vakur sum tann onnur lond hava at bjóða fram.

Eftir at øll høvdu verið í gjónni, bjóðaði Gjógv Adventure heita súpan, kaffi og ikki minst vaflur, á hugnaligu cafe´ini í bygdini. Hetta var ein deiligur endi á einum deiligum summardegi í Føroyum.




*Tað er ikki bara í heitaru londunum sunnanfyri, at snorkling kann nýtast sum frítíðarítriv*

## Regatta-sigling til Nólsoyar

Árliga regatta-siglingin, sum Hósvíkar Róðrarfelag skipar fyri, verður í ár vikuskiftið 11. og 12. august. Siglt verður av Eiði fríggjakvøldið 11. august kl. 19.00 til Hósvíkar.

Tá komið verður til Hósvíkar, eru allir luttakararnir bodnir til døgurða í Bygdarhúsinum. Og upp aftur seinni - tá maturin er farin niðurum - verður skipað fyri góðum ’Regatta-dansið í somu holum, og verður tað LM-Band, sum stendur fyri undirhaldinum.

Ætlanin er, at luttakararnir skulu kunna yvirnátta í Hósvík, har møguleiki verður at seta tjøld upp.

Leygarmorguninn eru allir luttakararnir somuleiðis bodnir til morgunmatar í Bygdarhúsinum, áðrenn leiðin gongur víðari til Nólsoyar, har nólsoyingar skipa fyri Ovastevnu.

Fyrireikararnir heita annars á fólk og bátar um at vísa varsemi tá siglt verður, eins og tað er hent at hava trygdarnet við á ferðini.

Tilmelding til tiltakið fer fram á www.hosvik.fo

**-mørk**